

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 10 - 2012

# Faroe Petroleum leigar boriskip til Novus brunn

Ikki kann sigast annað enn, at tey bæði føroysku oljufeløgini, Faroe Petroleum og Atlantic Petroleum eru rættiliga virkin hvør á sínum økjum. Bæði feløgini hava lagt seg eftir at vera partur av so nógvum leitiloyvum sum til ber og orka er til. Og her liggur Faroe Petroleum so sanniliga ikki á tí lætu síðuni. Dynamikkur og dirvi saman við einum vælumhugsaðum at spjaða sínar íløgur politikki tykist vera drívmegin, tá Faroe Petroleum leggur til brots. Felagið kunnger nú, at tað hevur gjørt sáttmála um at leiga boriskipið West Navigator til at bora Novus leitimiðið í seinnu helvt av 2013. Faroe, sum felagið oftani verður nevnt í aljóða oljupressuni, er fyristøðufelag og eigur 50% av loyvinum. Hini feløgini, sum eru við í verkætlanini. eru Centrica við 40% og Skagen 44 AS við 10%. Loyvið liggur nærhendis Heidrun kelduni í Norskahavinum. Graham Stewart, stjóri sigur, at teir eru sera væl nøgdir at hava gjørt sáttmála um boringina. Hetta verður aðru ferð, at føroyska oljufelagið átekur sær týdningarmiklu og krevjandi uppgávuna at vera fyristøðufelag í eini boriverkætlan á norska landgrunninum. Faroe Petroleum luttekur eisini í fýra øðrum leitibrunnum, sum verða boraðir næstu seks mánaðirnar í bæði bretskum og norskum sjógvi. Mynd West Navigator, sum skal bora fyri Faroe Petroleum